# Tað pelagiska tilfeingið

Í desember 2005 avtalaðu strandalondini EU, Føroyar, Ísland og Noreg, aftaná samráðingar í 6-7 ár á íalt 15 fundum, hvussu veiðan av svartkjafti skuldi býtast. Semja er eisini millum strandalondini um, hvussu veiðan av makreli skal býtast. Men hóast avtala var í nøkur ár um býtið av norðhavssildini, hevur eingin avtala verið seinasta árið, og heldur eingin er fyri 2006. Vónandi verður eisini avtala um sildina í framtíðini.

Fiskirannsóknarstovan hevur øll árini havt ein virknan lut sum ráðgevi hjá Landsstýrinum í samráðingunum um svartkjaft, og var eisini virkin í fyrireikingunum upp undir samráðingarnar um sild í 1995, og í fyrireikingunum upp undir samráðingarnar um makrel og svartkjaft í 1998. Vit tora at siga, at vísindaliga arbeiðið og kanningarnar, sum Fiskirannsóknarstovan hevur gjørt í sambandi við samráðingarnar, hevur gjørt mun, til tess at verja føroysk áhugamál.

Tíðin hevur víst, at ferðamynstrið hjá pelagiskum fiski kann broytast munandi við tíðini, og sostatt eisini nøgdin av fiski, sum støðast í ymsu búskaparligu økjunum. Strandalond, sum halda at meira fiskur gjøgnum árið er í teirra øki, enn býtið sigur, vilja tá hava lyndi til at ynskja at býtið verður endurskoðað. Eitt dømi um hetta er Noreg, sum segði avtaluna millum strandalondini um norðhavssildina upp í 2003. Uppsøgnin var grundað á, at ferðamynstrið var broytt soleiðis, at stovnurin av norðhavssild var nógv meira og longri inni í norskum øki, enn mett var út frá søguligu ferðingini.

Árini síðan 1995 er útbreiðslan av sild norðan fyri Føroyar broytt nakað hvørt ár. Meðan sildin fyrstu árini spjaddi seg longur og longur norður, hevur seinnu tvey árini eisini nakað av sild verið syðri á. Árgangurin av sild frá 2002 er mettur at vera stórur, og áhugavert verður at fylgja við hvussu hann fer at ferðast. Fer sildin aftur at ferðast, sum hon gjørdi í fimmti- og sekstiárunum, verður lutfalsliga meira sild í føroyskum øki, enn tað hevur verið seinnu árini.

Avreiðingarvirðið av kvotunum til Føroyar av sild, makreli og svartkjafti er millum 1 og 1,5 milliardir krónur, og merkir tað, at hvørt prosent, kvoturnar fara upp ella niður, hevur eitt virði upp á 10-15 milliónir krónur.

Øll lond hava bæði skyldu og ábyrgd at fylgja við og kanna fiskameingið í egnum øki, og út frá hesum kanningum at laga fiskiskapin, so hann er burðardyggur. Fyri fiskasløg, sum fleiri lond eiga í felag, er neyðugt at kanningarnar eru samskipaðar. Fyri tey pelagisku fiskasløgini sild, makrel og svartkjaft, eru slíkar samskipaðar kanningar, sum Føroyar eisini luttaka í. Fiskirannsóknarstovan hevur við Magnusi Heinasyni luttikið í altjóða samskipaðu kanningunum av sild og svartkjafti norðanfyri í mai-juni, og av svartkjafti sunnanfyri í mars-apríl, men hevur ikki tikið lut í kanningunum av makreli. Ivasamt er um hesar kanningar eru nóg mikið. Vit eiga helst at gera kanningar av makreli í føroyskum øki á sumri og heysti, og uttan iva verður neyðugt at fylgja við, um sild er í føroyskum sjógvi um veturin.

Umframt svartkjaft, sild og makrel, ferðast annar pelagiskur fiskur inn í føroyskan sjógv. Her er talan um prikkafisk, rossamakrel, lodnu og tunfisk. Av hesum fiskasløgum er lítil og eingin veiða, men við øktari vitan um ferðamynstur og betri veiðutøkni kann hugsast, at hesi fiskasløg í framtíðini kunnu fáa týdning fyri føroyska fiskivinnu. Umframt at gera rannsóknir við fiskirannsóknarskipi, verður eisini neyðugt, at vinnan og Fiskirannsóknarstovan fara inn í eitt virkið samstarv um at savna dáta frá skipunum, sum fiska pelagiskan fisk.

Frá kanningunum av streymgongdini fram við Føroyum við "doppler" streymmátarum síðstu tíggju árini hava vit tilfar, ið kann vísa hvussu nøgdin av livandi tilfeingi uppi í sjónum hevur verið gjøgnum árið. Tað krevur nakað av arbeiði at kanna hetta tilfar nærri, men uttan iva er í hesum tilfari nógv, ið kann geva okkum vitan um broytingar frá einum ári til annað, og eisini gjøgnum árið. Í størri høpi kann hugsast, at við menning av tøkni fer tað at bera til at senda dáta frá "doppler"-loddunum um fylgisvein ella á annan hátt, so tey kunnu nýtast beinanvegin.



Hjalti í Jákupsstovu
stjóri